einfaldari
- ger tað einfaldari
Juni 2012

# Jógvan Gerðalíð farin




Hósdagin 24. mai 2012 andaðist Jógvan Gerðalíð í Klaksvík, 95 ára gamal. Jógvan er ikki ókendur í Lívdini. Tað bar so á, at hann og konan Astrid vóru í Havn sunnudagin 26. august 2001, sama dagin sum, samkoman Lívdin hevði sítt fyrsta almenna møti í hølunum hjá Virkni við Sundsvegin. Jógvan fylti 85 ár hendan dagin. Hetta hevði við sær, at Jógvan fleiri ferðir hevur verið í føðingardegi hjá Lívdini. Seinast í sambandi við hátíðarhaldið, tá Lívdin fylti 10 ár í fjør. Vit minnast Jógvan við takksemi.

### Øll skriftin er innblást

Sum vit fara gjøgnum Hásongin hendan mánaðin, gleðist eg við Paulusi, ið segði: “Øll skriftin er innblást av Gudi og er nyttulig til lærdóm, til sannføring, til rættleiðing, til uppfostran í rættvísi, so gudsmenniskjað kann verða fullkomið, ført fyri at gera alt gott verk.” (2. Tim. 3:16-17). Sanniliga er Bíblian ein viðkomandi bók, ið nemur við øll lívsins viðurskifti.

Mátti Hásongurin, sum er 3000 ára gamal, hjálpt bæði ungum, miðalaldrandi og eldri at liva vituga, vísiliga og virðiliga saman sum pør, Harranum til dýrd, øðrum til uppbygging og okkum sjálvum til gleði og frið.



*Jógvan Zachariassen*

## Hendingar & tiltøk

### Osvald Kjærbo (1923-2012)



Mánadagin 28. mai 2012 andaðist Osvald Kjærbo í Havn, 89 ára gamal. Osvald varð føddur í 1923 í Sumba og flutti til Havnar at búgva í 1950. Frá ungum virkaði hann innan brøðrasamkomurnar og ferðaðist kring landið við gleðiboðskapinum. Í mong ár stjórnaði hann “Emmaus Bíbliuskúla”, sum hevur givið út meira enn 20 bíbliubrævaskeið. Hann hevur eisini givið út bøkur og annan andaliga lesnað. Vit minnast Osvald við takksemi.

### Samtalur og forbøn

Fólk frá Glóðini eru tøk aftan á seinna møtið sunnudagar at samtala ella at gera avtalu um samtalu. Glóðin er ein tænasta í Lívdini, sum er ein útrættur armur til menniskju, sum hava eitthvørt at stríðast við sum t.d. tunglyndi, ótta, sorg, vreiði, hjúnabandsviðurskifti ella tvístøður. Fólkini í Glóðini hava tagnarskyldu. Eisini ber til at venda tær til Glóðina á tlf. 280011.

### Brúðarvígsla í Lívdini



Brúðarvígsla var í Skúlanum við Løgmanna-breyt leygardagin 19. mai. Tað vóru Judith Lindarstein og Dánial Lindenskov, sum giftust hendan dagin. Nógv fólk vóru komin til vígsluna, og aftaná var høvi at heilsa upp á brúðarparið og familjuna.

Vit ynskja teimum hjartaliga til lukku við hjúnabandinum.

## Starvsfólk til Zarepta




Til ber at tekna seg sum starvsfólk til Zarepta-legurnar á tel. 284040 ella 216140

Familjulegurnar byrjaðu 1. juni, og summar-legurnar byrja 29. juni.

Faldarar við upplýsingum eru á kunningar-borðinum hjá Lívdini, meðan møtini eru sunnnudagar.

## Kærleiksbrøvini halda fram




IKTUS sjónvarp heldur fram hendan mánaðin at senda røðina "Bíblian - 66 kærleiksbrøv". Hetta eru talur, sum hava verið í Lívdini í vár. Talan er um tilsamans 10 partar.

IKTUS sendir mikudag til leygardag kl.11:00, 16:00, 21:00 og 02:00. Sunnudag frá kl.14:30 og 21:00 verður endursent frá vikuni. Sí skránna og les meira á www.iktus.fo.

## Postadressan hjá Lívdini

Postadressan hjá lívdini er:
Samkoman Lívdin, Oman Hoydalar 28,
Postsmoga 3116, FO188 Hoyvík.

## Lívdin á Facebook

Lívdin hevur sín egna profil á Facebook, sum er: www.facebook.com/Livdin. Har verða upplýsingar um aktivitetir o.a. regluliga lagdir út.

## OM Transform 2012

OM Transform verður aftur í summar við 40 ymiskum toymum í 18 londum. OM Transform var fyrstu ferð í 2010 og var til stóra signing og frelsu fyri mong menniskju.

Øll toymini verða fyrst saman til fyrireiking á Transformstevnu í Rom í Italia frá 16. til 21. juli. Les meira á www.om.fo

## PAROLA 2012

Frá 6. - 13. august 2012 verður føroyskur minibíbliu-skúli í Italia.

PAROLA, ið merkir orð, hevur til endamáls at geva trúgvandi føroyingum møgu-leika at koma burtur frá strongda gerandisdegnum og brúka tíð í Orðinum.

Um hetta hevur tín áhuga, kanst tú seta teg í samband við Einar Vang tel. 528038 einarvang74@gmail.com ella Regin Guttesen tel. +39 32 8141 2581 reginguttesen@gmail.com.

## TeenStreet 2012




TeenStreet 2012 verður í Oldenburg í Týsklandi frá 28. juli til 4. august. www.teenstreet.fo

## Bøn og undirvísing

Týskvøld kl. 20.30 er møti í Lonini oman Hoydalar 28. Triðja hvørt týskvøld eru kyknu-bólkar.

## Skráin fyri týskvøldini juni 2012

| | |
|---|---|
| Týskvøldið 5. juni | Kyknubólkar |
| Týskvøldið 12. juni | Bønarmøti |
| Týskvøldið 19. juni | Bønarmøti |
| Týskvøldið 26. juni | Kyknubólkar |

# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

### Sunnudagin 3. juni

Familjumøti kl. 10.30: Beinta Áargarð sigur søgu

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Hásongurin: At liva saman
Talari: Jógvan Zachariassen



Beinta

### Sunnudagin 10. juni

Familjumøti kl. 10.30: Shino og Hallur Mortensen greiða frá verkinum

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Hásongurin: At búnast saman
Talari: Jógvan Zachariassen



Jógvan

### Sunnudagin 17. juni

Familjumøti kl. 10.30: Jóna Gunnarsson tekur lut

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Hásongurin: At eldast saman
Talari: Jógvan Zachariassen



Hallur og Shino

### Sunnudagin 24. juni

Familjumøti kl. 10.30: Durita og Pauli Djurholm send út

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Talari: Hallur Mortensen

### Ungdómstiltøk:

Alive: leygarkvøld kl. 21.00



Jóna

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*



Durita og Pauli

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*